# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ósolidarisku Føroyar

Nú kemur trupulleikin av leistinum, har undirsjóvartunlarnir partvíst verða fíggjaðir við brúkaragjaldi. Leisturin varð uppfunnin av Fólkaflokkinum, og allir hinir flokkarnir lupu glaðbeintir eftir hesum leisti. Eisini flokkar sum Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, sum annars skulu eitast at tryggja samhaldsfesti í hesum samfelagnum.

Vit mæltu á hesum stað frá at gera almennu tunnilspartafeløgini og lata landið fíggja og gjalda undirsjóvartunlarnar, eins og landið hevur goldið tann, í dagsins pengum, nógv dýrari Oyggjarvegin, brúnna um Streymin og allar aðrar landsvegastubbar í Føroyum, men tiltakið við brúkargjaldi tyktist vera sera populert milllum veljarar, hóast tað var eitt óumhugsið og inkonsekvent tiltak.

Leisturin við brúkaragjaldi er altíð lættur at argumentera fyri, tí hann appelerar til tað meiri smáttskorna í føroyinginum, har tankagongdin tykist verða, "hví skal eg gjalda fyri onnur".

Brúkaragjald er ein møguleiki, har ferðslan er so mikið stór, at hon ber íløguna, ella part av henni. Trupulleikin er bara, at undirstøðukervið í Føroyum fyri ein stóran part ikki ber seg í rakstrarligari merking, hóast tað samfelagsliga er nógv vert og tørvar framhaldandi útbygging.

Tá vit nú tosa um Sandoyartunnil, sum sjálvsagt eisini eigur at umfata ferðslu til Suðuroyar uppá sikt, so er greitt, at hesin tunnil neyvan kann fíggjast við brúkaragjaldi. Her kemur so formaður Tjóðveldisfloksins við einum uppskoti, har allir tunlarnir skulu koyrast í eina pulju, sum so skal gjalda allar tríggjar. Hetta hevur skapt ramaskríggj í Vágum og Norðoyggjum, tí hesi øki vilja bert gjalda "teirra" tunnil. Hetta er ikki óvæntað, tí henda "okkara tykkara" hugburð hava politikarnir sjálvir feilin av, tá teir í áravís hava lagt tað út sum undirsjóvartunlarnir hjá vágafólki og norðoyingum, hóast teir eru líka nógv tunlar Føroya fólks eins og ein og hvør annar landsvegstubbi kring landið.

Uppskotið hjá Høgna Hoydal er eitt stig rætta vegin í tí merking, at tað appelerar til tað samhaldsfasta í føroyingum, men trupulleikin er bara, at loysnin er ikki at gera ein eitt lítið sindur størri pott at gjalda alt av, sum formaður Tjóðveldisfloksins skjýtur upp. Alt eigur at verða goldið úr stóra potti – landskassanum. Alternativið er at lække vegskatt og skatt annars og gjøgnumføra brúkaragjald á vegunum á ein konskekventan máta við einari konsekventari argumentatión, sum ikki finst í dag.

Brúkaragjald á vegum og 50% skattur, umframt ymisk avgjøld, hoyra ikki heima í sama samfelag, og diskussiónin við Sandoyartunlinum tænir í hvussu so er endamálinum, at fáa hetta fram. Vónandi síggja politikarnir nú sítt mistak.

**Sosialurin**

# Skopunarfjørður er okkara Berlin-múrur!

**PÁLL Á REYNATÚGVU**
løgtingsmaður og borgarstjóri



Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loypti veruliga øði í grindina tá ið hann borðreiddi við síni óbúnu útsøgn um at steðga ætlaða Sandoyartunlinum. Her sunnanfyri Skopunarfjørð kann sigast at landsstýrismaðurin setti sandoyar sýslu í undantaksstøðu. Hann kundi eins væl avlýst jólini hjá øllum heimsins børnum, jólaaftansmorgum.

**Heitur búskapur**

Útsøgnin verður av summum (óheftum) greinarum søgd at vera skilagóð fyri føroyska búskapin, tí føroyski búskapurin er ov heitur í løtuni. Higartil tað einasta argumenti, sum spinnátaki norðanfjørðs hevur barlslað við. Eri ikki ósamdur við útsøgnini um heita búskapin, men ikki skulu vit leita her um leiðir í Sandoynni, fyri at finna heitan búskap. Her er eingin ovurhiting. Einki alment arbeiði er sett í verk her undir hesari samgonguni hettar trý og eitt hálvt ára skeiðið. Eingin havnabygging í Skúvoy. Eingin tunnil til Dals. Eingin tunnil í Sandarlíð. Eingin Listaskúli. Eingin ítróttarhøll. Einki sambýli. Einki almenn skrivstova. Einki alment fíggjað nakað. Snøgt sagt. Og hvar eru uppskotini um at taka trýstið av miðøkinum?

**Vinnan**

Samstundis vita vit at Sandoyar økið er tað økið í landinum, sum stendur allar veikast vinnuliga. Eittans skip eftir í oynni. Virkini koyra enn, men undir sera truplum treytum, og uttan iva við afturpartinum í vatnskorpuni. Á aliøkinum hevur Sandoyggin verið hildin niðri í einari lívfiskaspennitroyggju, sum er gagnlig fyri alt landið, men lítið gagnlig fyri okkum sum alimøguleiki. Annað vinnuligt virksemi hevur truplar byrjunardagar. Tað er harmiligt at so er, men veruleikin.

**Fólkatal og samanseting**

Fólkatalið í Sandoynni varð omanfyri 1800 áðrenn kreppuna. Vit hava ikki fólkavøkstur í dag. Talið er u.l. 1450 íbúgvar í sýsluni. Smærru bygdirnar í sýsluni eru spakuliga fallandi. Sand og Skopun halda nøkulunda tørn og fremsta orsøkin til tess er uttan iva vónin um Sandoyartunnilin. Fleiri ungar barnafamiljur hava valt eina sjóvegis pendlaratilveru, sum fyrilbils loysn áðrenn tunnilin. Oyggin hevir verið vælsignað við rímiligum burðatali seinnu árini, men samstundis má ásannast at eldru borgarar okkara eru yvirumboðaðir í stóran mun. Sandoyggin er u.l. 3% av fólkatalinum í Føroyum, meðan tey omanfyri 67 eru nærri teimum 6 %.

**Skuldarbyrða, skattatrýst og lágar inntøkur**

Tað er ikki nakað dulsmál at Sands Kommuna og Skopunar Kommuna framvegis stríðast ein harðan dyst við gamla kommunuskuld, og mær vitandi er støðan ikki fíggjarliga glæstrilig í smærru bygdunum heldur. Tá ið kommununar, sum felagsøki, samstundis hava eitt tað hægsta skattatrýstið í landinum og ein stóran bólk av vanligum arbeiðandi fólki, sum ikki vinnur sær risainntøkur, so er ikki trupult at ímynda sær hvussu hættislig støðan í veruleikanum er hjá Sandoynni, sum framtíðar staður hjá ungum familjum. Persónliga havi eg valt ein jaligan hugburð til truplu støðuna, og havi ongantíð verið í fjølmiðlunum og gramt meg um hvussu stór "neyðin og elendigheitin" er. Haldi ikki at tað er føði at borðreiða fyri ungum fólki.

**Tunnilin er vónin, og vónin er tunnilin**

Eingin orsøk er til at gera Sandoyartunnilin til eitt spjaðingarmál í Føroyum. Teimum er nóg mikið av. Allir føroyingar hava fingið gagn av Vágatunnlinum og Norðoyatunnlinum, og eg eri persónliga ogvuliga glaður um at hava verið við til at samtykt uppskotini um hesar tunnlar. Fyrimunurin hjá hesum økjum er ómetaligur á øllum økjum. Eindin fyri norðan virkar vinnuliga, sosialt, ítróttarliga, ja, á øllum økjum. Og tað kann eingin annað enn frøðast um. Og júst tí at vit onnur, sum enn ikki eru komin uppá turt, síggja hvussu hent og ómakaleyst virksemi gongur, gerst dreymurin bara uppaftur størri um at verða partur av eindini. Tað er tørvur á at ansa eftir búskapi og pengum í hesum landinum, men vit muga ansa eftir at vit ikki skerja tað veikasta økið, í royndini at seta meira ferð á restina.

Allar staðir kring heimin royna menniskjuni at styrkja um flytbari. Lokalt sum globalt. Vit minnast øll tá ið Berlin-múrurin rapaði. Frælsið og flytbari vann á afturhaldi og innilæsing. Tíbetur. Somu kenslu hevði eg, tá ið seinasta skotið varð skotið undir Vestmannasundi. Múrurin sum hevði avbyrgt Vágafók frá meginøkinum rapaði og á sama hátt nú Norðoyatunnilin gjørdist veruleiki. Enn ein Berlinmúrur fallin. Fantastiskt.

**Vit hava álit á at tit ikki lata okkum falla!**

Skopunarfjørður er í dag okkara Berlin-múrur. Tað er okkara skylda sum samfelag, og í felag at fáa tikið tann múrin niður eisini. Eingi orsøk er til at finna syndabukkar. Vit skulu gera tað sum vit megna, men vit megna tað ikki uttan tykkara hjálp. Og vit hava álit á at tit standa við tykkara orð og hjálpa okkum í eina vinnarastøðu aftur.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.